## Kim Dae-jung deyður

Fyrrverandi suðurkoreanski forsetin Kim Dae-jung er deyður eftir at hava ligið á sjúkrahúsi teir seinastu mánaðirnar við lungnabruna. Hann bleiv 85 ár. Kim Dae-jung verður roknaður sum ein av undangongumonnunum fyri demokratii í Asia. Í seksti- og sjeytiárunum stóð hann á odda fyri andstøðuni í Suðurkorea, sum tá hevði hernaðarstýri, og hann sat fleiri ferðir í fongsli og húsavarðhaldi. Í 1998 varð hann valdur til landsins forseta, og í 2000 tók hann stig til ein søguligan toppfund við Norðurkorea. Tað var hann Nobel-friðarheiðurslønina fyri seinni.



## 600 børn eitrað

Fólk í kinesisku bygdini Basoji lupu í gjár á eitt virki, sum bræðir sink og blýggj, tí tey vilja vera við, at virkið sum hevur eitrað meiri enn 600 børn. Fólk brutu girðingarnar kring virkið og løgdu á fleiri flutningsbilar hjá virkinum, skrivar almemnna tíðindastovan Xinhua. Myndugleikarnir hava meiri enn 100 løgreglumenn at sissa tey illu bygdarfólkini. Sambært BBC hevur virkið viðurkent, at roykurin frá bræðingini kann vera eitrandi, og hevur virkið tí átikið sær ábyrgdina av, at meiri enn 600 børn eru vorðin sjúk, og at umleið 150 teirra eru flutt á sjúkrahús.

# 60 fólk færri á MEST



**Síðan ársbyrjan, eru nú eini 60 fólk færri í starvi hjá skipasmiðjuni MEST, sum tó framvegis hevur fitt av virksemi í Havn, Skála og í Runavík. Stjórin, Eyðfinn Egholm, ásannar, at tað verður trupult at fáa árið í ár at hanga saman fíggjarliga, men hann vónar kortini, at samlaða virksemið fer at geva eitt lítið avlop, tá samanum kemur**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

MEST, sum er ein samanrenning av skipasmiðjunum í Havn og á Skála, bedingini í Vestmanna og fyrrverandi FJM í Runavík, hevur í hesum árinum sagt umleið 60 fólkum úr starvi. Tíðliga í hesum árinum segði felagið 25 fólkum upp, og í summar eru 35 fólk aftrat søgd úr starvi.

### Neyðug tillaging

Stjórin í MEST, Eyðfinn Egholm, sigur, at uppsagnirnar, sum felagið hevur sæð seg noytt til at fremja til tess at laga fyritøkuna til minkandi virksemi, ikki bert fevna um sjálvt smiðjuvirksemi, men eisini um eitt nú goymslu-og skrivstovuvirksemi.

- Vit eru umleið 200 fólk í starvi hjá MEST í dag, og vit vóna, at grundarlag verður fyri okkum øllum, ið eftir eru. Líkt er eisini til, at tillagingin, sum verið hevur, er á leið hon, sum tørvur nú tykist vera á.

Tórshavnar Skipasmiðja hevur heilt síðan byrjan verið ein væl rikin fyritøka, sum hevur havt avlop í rakstrinum á hvørjum ári. Men fyritøkan er eisini vaksin við keypi av øðrum smiðju-og bedingsvirksemi, eitt nú skipasmiðjuni á Skála og FJM í Runavík, sum serliga arbeiðir við rustfríum stáli.

Eyðfinn Egholm sigur, at árið í fjør gav eitt lítið avlop.

- Í fyrru helvt av 2008 høvdu vit framvegis byggisáttmála á Skála, men seinasti ársfjórðingur av árinum royndist ikki væl. Í ár hevur verið uppaftur minni virksemi, og tí hava vit verið noydd at tillaga arbeiðsorkuna og harvið lønarútreiðslurnar til minkandi virksemi.

### Hampiligt summar

Eyðfinn sigur, at í løtuni eru tvey skip á bedingini hjá MEST í Havn. Hesi eru pelagiska skipið Næraberg og línuskipið Venus.

Á Skála standa tveir ísfiskatrolarar í dokkini. Teir eru Kalsevni og Grímur Kamban, eins og garnaskipið Oknin hevur staðið á bedingini á Skála seinastu vikurnar.

- Í flestu førum er talan um vanligt viðlíkahald, men í onkrum føri er talan um heldur størri arbeiði.

Hann sigur, at teir, sum eiga Oknina, bíða eftir eykaluti, og tí hevur skipið staðið uppi so leingi.

- Tað hevur verið rímiligt við virksemi í juli og higartil í august, men soleiðis, sum gongdin hevur verið tað mesta av einum ári, er ikki vanligt, at "listin" yvir umvælingar og aðrar ábøtur er langur. Skip koma og fara, og tí er torført at meta um, hvat liggur fyri framman.

Spurdur, um tey umleið 200 fólkini, sum í dag starvast hjá MEST, kunnu vænta sær at vera verandi, endurtekur stjórin, at soleiðis, sum út sær beint í løtuni, vónar hann, at so verður.

### Skifta ímillum

Minkandi virksemi hjá MEST hevur ført til, at neyðugt hevur verið at skift fólk ímillum eitt nú MEST í Havn og MEST á Skála – alt eftir, hvar skipini eru uppi, og hvørjar umvælingarnar eru.

Tá tað fyrr í summar ljóðaði, at MEST at kalla fór at gevast við sínum virksemi á Skála, vóru fólk sum hildu, at hetta illa kundi passa.

Á Skála er stór dokk og

### FAKTA

MEST-samtakið er ein samanrenning av MEST Tórshavn, MEST Skála, MEST Vestmanna og MEST Runavík. Avbjóðingin hjá samtakinum er í høvuðsheitum at smíða, umbyggja og umvæla skip. Hetta verður gjørt í Tórshavn, á Skála og í Vestmanna. Deildin í Runavík arbeiðir serliga við rustfríum stáli og veitir tænastur til hesar. PAM Offshore Service er dóttirfelag hjá MEST, sum hevur virksemi í Noregi.